NÓTASKIP

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postboks 2039
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 14. november 2025

Ummælisskriv til Fíggjarmálaráðið um broytingar í Veiðigjaldslógini

Felagið Nótaskip hevur fríggjadagin tann 20.oktober 2025 fingið uppskot til ummælis um broytingar í Veiðigjaldslógini.

Felagið Nótaskip mælir frá at gera hesar broytingar, ið hava til endamáls at strika § 7 um helvtargjald í Veiðigjaldslógini, tá ið kvotan er minni enn miðal kvotan seinastu fimm árini av einum ávísum fiskaslagi.

Prísurin javnar ikki lágu kvoturnar

Yvirskipaða endamálið við § 7 um helvtargjald í Veiðigjaldslógini er at áseta skipum eitt lægri veiðigjald, tá ið ein ógvusligur og brádligur kvotaniðurskurður hevur við sær, at inntøkurnar lækka munandi.

Tað ber longu til at staðfesta, at bæði makrelkvotan og svartkjaftakvotan fara at minka heilt munandi í 2026. Hetta verður ein avbjóðing hjá føroysku uppsjóvarvinnuni, og tí er hetta ikki rætta løtan at strika hetta trygdarnetið hjá vinnuni.

Tað bendir nógv á, at samlaða avreiðingarvirðið fyri makrel komandi ár fer at minka munandi sammett við seinastu árini. Høvuðsorsøkin er stóri niðurskurðurin, sum ICES ráðgevingin mælir til. Tað er framvegis ógreitt, hvør endaliga makrelkvotan verður í 2026, men talan verður um ein heilt munandi niðurskurð.

Tilmælið hjá ICES ráðgevingini er at skerja makrelkvotuna við 70 prosentum. Gerst hetta veruleiki, verður tøka føroyska makrelkvotan komandi ár einans 16

prosent av miðalkvotuni í árunum 2021 til 2025. Hetta verður sjálvandi ein dyggur smeitur hjá reiðaríum, virkjum og manningum.

Ein afturvendandi høvuðsgrundgeving hjá Fíggjarmálaráðnum er, at verandi veiðigjaldslóggáva ikki tekur hædd fyri, at ein hægri prísur *ofta* vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Dømi um hetta er makrelprísurin í ár, sum støðugt er vaksin, men hesin vøksturin er ikki óendaligur, sum tú kanst fáa eina fatan av, tá ið tú lesur uppskotið hjá Fíggjarmálaráðnum. Ilt er at spáa um framtíðina, men tað er lítið sannlíkt, at makrelprísurin komandi ár fer at viga upp ímóti tí væntandi nógv lægri makrelkvotuni. Grundleggjandi er ikki nøkur vissa fyri, at ein hægri prísur bøtir fyri nógv lægri makrelkvotur.

Tað er neyðugt at leggja afturat, at umframt stóra niðurskurðin í makrelinum, minkar svartkjaftakvotan við heili 41 prosentum komandi ár. Við umfatandi niðurskurði í bæði makreli og svartkjafti fara inntøkurnar hjá føroysku reiðaríunum at minka nógv komandi ár.

Tann 30.oktober 2025 kunngjørdi ICES tey vísindaligu tilmælini fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild fyri 2026. Komandi vikurnar verður farið undir bilateralu samráðingarnar við onnur lond, og ikki fyrr enn tær eru av, fæst við vissu at vita, hvørjar tøku føroysku kvoturnar verða komandi ár.

Eitt fyribils yvirlit sær soleiðis út:

	FO KVOTA %	KVOTA 2025	VØKSTUR / MINKING % 2026	Vøkstur / minking tons	Kvota 2026
Svartkjaftur	35,53%	513.994	-69,78 %	-211.512	302.483
Makrelur	12%	77.024	- 41,17 %	-56.101	20.923
Norðhavssild	10%	40.179	32,88 %	+13.212	53.391

Vantandi útgreiningar

Tað er merkisvert, at Fiskimálaráðið ikki hevur ítøkiligar útrokningar ella metingar við í uppskotinum. Hetta er ikki fyrstu ferð, tá ið skotið verður upp at broyta Veiðigjaldslógina. Tað hevði verið upplagt at havt eina meting í lógaruppskotinum um, hvussu nógv inntøkan frá veiðigjøldum hækkar í 2026, um § 7 Veiðigjaldslógini verður strikað.

Felagið Nótaskip og Føroya Reiðarafelag hava tí í felag gjørt nakrar metingar um avreiðingarvirði og veiðigjøld komandi ár. Tað er lítið at taka seg aftur í, at við einum makrelniðurskurði á til dømis 70 prosent, fer samlaða veiðuvirðið at lækka nógv. Ein meting er, at netto avreiðingarvirðið á makreli komandi ár verður umleið eina milliard krónur. Tað er nærum helvtina minni enn í ár. Lækkar makrelkvotan hinvegin við 48 prosentum, so lækkar netto avreiðingarvirðið við einum triðingi, vísa okkara metingar.

Mett netto veiðivirði		***makrel - 70 %***	***Makrel - 48%***
mió.kr.	***2025***	***2026***	***2026***
Samlað veiðivirði	2.332	1.258	1.533
Veiðigjøld	-418	-269	-345
Netto veiðivirði	***1.914***	***989***	***1.188***

Tað er eisini undranarsamt, at tað ikki verður nevnt í uppskotinum, at øll uppsjóvarfiskasløg fáa eitt hægri veiðigjald næsta ár. Í verandi Veiðigjaldslóg er ein innbygd hækking, har veiðigjaldsstigin hækkar við tveimum prosentstigum í 2026. Tað ruddiligasta hevði verið at nevnt hesa hækking í hesum uppskotinum.

Stríðir móti endamálinum

Tá ið Veiðigjaldslógin í 2021 varð løgd fram, varð skrivað, at endamálið við lógini var at fáa í lag eina skipan við veiðigjaldi í eina *fasta legu til gagns fyri vinnu og fyrisiting*. Eisini varð áherðsla løgd á, *at veiðigjaldið frameftir verður tillagað eftir skipaðum viðurskiftum, sum fylgja umstøðunum í fiskiskapinum*.

Hetta triðju ferð seinastu tvey árini, at skotið verður upp at gera broytingar í Veiðigjaldslógini. Sostatt er torført at grundgeva fyri, at talan er um *skipað viðurskifti* ella *fasta legu*.

Tað ber illa til hjá vinnuni at leggja sítt virksemi til rættis, tá ið politiska skipanin upp í saman tekur stig til slíkar broytingar. Tað er neyðugt, at veiðigjøldini eru í fastari legu. Skipanin skal handfara skiftandi gongdina í fiskivinnuni, og ikki verða broytt í tíð og ótíð. Bara soleiðis kann fiskivinnan undir tryggum kørmum skapa virði til bæði land og vinnu.

Felagið Nótaskip heldur eisini, at ætlaðu broytingarnar í § 7 stríða eisini ímóti endamálinum við lógargreinini, ið er at veita vinnuni eitt trygdarnet, tá ið kvoturnar brádliga lækka nógv. Trygdarnetið, sum vinnan og politiska skipanin avtalaðu, skuldi spennast um vinnuna, verður nú tikið burtur. Hetta var ein týðandi áseting, sum gjørdi sítt til, at semja fekst millum vinnuna og politisku skipanina um veiðigjøldini í 2021. Við at strika § 7 verður ein týðandi lutur tikin burtur úr heildini, sum varð avtalað fyri fýra árum síðani. Felagið Nótaskip er tí av teirri fatan, at ætlaða broytingin brýtur við ta skipan, sum hevur verið.

Samanumtikið

Felagið Nótaskip tekur ikki undir við uppskotinum um at strika § 7 um helvtargjald í Veiðigjaldslógini, og mælir frá, at uppskotið verður sett í verk.

Vinarliga

Felagið Nótaskip

Páll Holm Johannesen, *stjóri*

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip.fo